# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein




## HJARTALIG JÓLAFLØGA

Kvinna hevur útgivið spildurnýggju Jólafløguna. Hetta er fyrsta jólafløgan við jólaløgum frá føroyskum songkvinnum. Lena, Guðrið Hansdóttir, Linda Andrews, FAROE5, Sigrey, Suð og Drós eru bara nøkur av kendu nøvnunum, sum eru á Jólafløguni. Á Jólafløguni eru tvey spildurnýggj jólaløg, sum Kvinna hevur latið gjørt. Harafturat eru 6 nýggjar innspælingar av kendum jólaklassikarum og 5 jólaløg, sum eru útgivin áður.

**KVINNA**

Jólafløgan



## FLIPPAR STÅLE ÚT?

FC Keypmannahavn hevur ein veruliga møguleika at spæla seg víðari frá bólkaspælinum í Champions League fótbóltskappingini. Eydnast hetta, verður tað fyrstu ferð, at eitt danskt felag kemur so langt í heimsins sterkastu fótbóltskapping – og so kunnu vit enn einaferð uppliva, at norski venjarin Ståle Solbakken verður á gosi. FCK skal í seinasta umfarinum av bólkaspælinum spæla ímóti grikska felagnum Panathinaikos á heimavølli. Ein sigur tryggjar FCK víðari luttøku, men hóast danska felagið tapir, so kunnu teir koma víðari, um Barcelona vinnur á Rubin Karzan.

**FCK-PANATHINAIKOS**

Champions League

Týskvøldið 7/12 kl. 19.45



## BORGEN TIL JÓLAMÁNAÐIN

Seinastu vikurnar hevur sjónvarpsrøðin Borgen savnað nógvar hyggjarar í Danmark. Eisini í Føroyum, her fólk hava kunnað sær røðina bæði í SvF og á DR, hava eisini nógv fólk fylgt við. Ivast tú í, hvat alt hóvastákið snúði seg um, misti tú onkran part, ella kundi tú hugsa tær at sæð røðina umaftur, so hevur tú møguleikan til tað. Í farnu viku kom dvd-pakki út við øllum pørtunum, sum higartil eru gjørdir av Borgen.

**BORGEN – RØÐ 1**

Dvd-pakki



## SYMFONIORKESTRIÐ SPÆLIR FYRI FAMILJUM

Føroya Symfoniorkestur hevur komandi vikuskiftið tvær jóla- og familjukonsertir. Onnur verður í Klaksvík, og hin verður í Havn. Konsertin er, sum heitið ber boð um, jólakonsert fyri alla familuni. Skráin er fjølbroytt við jólatónum, filmstónleiki og felagssangi. Eisini verða ungir solistar og stórt barnakór við á konsertunum. Annfinnur Heinesen er frásøgumaður, og Bernharður Wilkinson stjórnar

**JÓLA OG FAMILJUKONSERTIR**

KÍ-høllin 4/12 kl. 16.00

Høllin á Hálsi 4/12 kl. 16.00




## GULLGENTAN

Gullgentan er tað fimta søgusavnið, sum Hanus Kamban letur úr hondum, og umboðar eina avgjørda snaring í hansara søgukynstri. Í øllum savnsins tíggju tekstum verður lesarin leiddur út ígjøgnum veruleikas dyr og inn í dreym, søgn, ævintýr og framtíð ella inn í eitt sjónarvovið univers, har tað ómøguliga, merkiliga, ókunnuga og ræðuliga spegla aftur menniskjans leiklut og avbjóðingar í einum heimi, har hon er fremmand og kanska sum frá líður verður avrøkt.

**HANUS KAMBAN**

Gullgentan



## HANUS Í RÆTTA ESSINUM

Hanus G. Johansen hevur nú givið nýggja fløgu út, har hann tulkar yrkjaran Pól F. Joensen. Fløgan kallast Hørpuspælarin. Hanus hevur eitt serligt forhold til yrkingarnar hjá Pól F, og hann hevur gjørt eini 70 løg til yrkingar hjá honum. Hóskvøldið hevur Hanus útgávukonsert í Norðurlandahúsinum, og av tí at áhugin fyri konsertini er so stórur, verður eykakonsert fríggjakvøldið.

**HANUS G. JOHANSEN**

Norðurlandahúsið

Hósdagin 9/12 kl. 19.30

Fríggjadagin 10/12 kl. 19.30